# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




# Samskip størri skip á Føroyaleiðini

FARMAFLUTNINGUR
*Jústinus L. Eidesgaard*

Flutningsfelagið Samskip hevur fingið tvey nýggj skip at røkja útgangandi rutuna frá Føroyum. Nýggju skipini, sum eita eins og tey gomlu eita Akrafell og Hvassafell eru 1.139 teus til støddar í mun til tey gomlu sum vóru 667 teus. Teu er mátið fyri eina 20 fóts bingju og tað merkir, at nýggju skipini taka 1139 20 fóts bingjur hvørt. Tey ganga 18,5 míl í mun til hini, sum gingu 14 míl. Longdin er 149 metrar og breiddin 23 metrar.

Skipini eru í rutuni Kollafjørður, Rotterdam, Immingham, Reykjavík, Reyðarfjørður og aftur á Kollafjørð. Silgt verður av Kollafirði hvønn fríggjadag og skipini lossa í Rotterdam mánamorgun.

Hini skipini á Føroyarutuni eru Helgafell og Arnarfell, sum eru skrásett í FAS. Tey eru 909 teus, 137 m long, 21,6 m breið og ganga 18,2 míl. Tey sigla á rutuni Reykavík, Immingham, Rotterdam, Cuxhaven, Varberg, Aarhus og Kollafjørð við komu á Kollafjørð árla mánamorgun.

Samskip byrjaði virksemið í Føroyum í 2004 og í dag eru góð 60 ársverk knýtt til hetta felag á klettunum. Í dag verður bara siglt á Kollafjørð, har Samskip eisini eigur eina stóra frystigoymslu, sum tekur 7000 tons.

*Hvassafell avmyndað á Kollafirði, har Samskip hevur stórt virksemi*






**KIA Magentis**

Við sínum 4,7 m er hann ein stórur bilur. Plássið innan er øgiligt. Hann er fult á hædd við dýrari bilar í sama flokki. Í bíligastu útgávuni kostar hann millum helvt og triðing av tí, luksusbilar í hesum flokkinum annars kosta. Kia Magentis er ein lekkur privatbilur og familjubilur, vælegnaður sum firmabilur eisini. Talan er um eitt "tíðarleyst design", hetta er ein supermodernaður og vælútgjørdur bilur við eini klassiskari sedan-útsjónd, sum ongantíð fer av móta.

**úr kr. 224.800**


Kia Picanto úr kr. 124.800


Kia Sorento úr kr. 375.800


Kia Carnival úr kr. 334.800


Kia Rio úr kr. 159.800


Kia Carens úr kr. 256.800


Kia cee'd úr kr. 184.800

**Kia – millum heimsins fremstu bilaframleiðarar**

Kia Motors hevur bygt sína egnu bilverksmiðju í Evropa og floymir nú yvir evropeiska marknaðin við rúkandi ferð. Talan er um eina bilverksmiðju, sum hevur stórar ætlanir í Evropa. Verksmiðjan er ein tann mest framkomna í øllum heiminum, og í 2007 tóku teir allan bilaídnaðin á bóli við at geva heilt upp til 7-ára garanti upp á sínar bilar. Málsetningurin hjá Kia Motors er heilt greiður. Teir skulu verða millum heimsins størstu bilframleiðararnar.

BERG MOTORS

Staravegur 1-3 · FO-100 Tórshavn · tel 31 35 35 · fax 31 77 35
Stoksoyrarvegur 8 · 700 Klaksvík · tel 45 74 74 · fax 45 74 11
info@bm.fo · www.bm.fo